## Nú er tryggari hjá tjørnuvíkingum

Mikudagin í farnu viku var arbeiðið at seta upp trygdarhegnið á Tjørnuvíkarvegnum liðugt. Tað vóru fólk frá norska Mesta AS sum stóðu fyri arbeiðinum. Hetta arbeiðið miðaði eftir at fyribyrgja at grót kom oman á vegin, og sum aftur var til stóran ampa fyri bygdarfólkið og ferðsluna annars. Arbeiðið byrjaði 25. september, og hevur gingið betri enn væntað. Tað tók góðar fýra vikur, sum eru umleið tríggjar vikur styttri enn upprunaliga tíðarætlanin segði. Hegnið eru fýra metrar høgt og kann steðga steinum, sum viga upp til 10 tons. Játtanin til arbeiðið í ár var 2 mió kr.

sb.



# Javnaðarflokkurin vil vinna bæði fólkatingsvalið og løgtingsvalið

**- Og hann vil hava øll við, tí hann ætlar sær at tryggja, at ongin dettur niðurímillum. Hann vil eisini hava sjálvstøðugt samstarv við Danmark**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Javnaðarflokkurin ynskir eitt rættvíst samfelag og ein rættvísan heim uttan fátækt.

Og flokkurin leggur afturat, at hann vil eisini hava ein heim við friði og umhvørvisligari javnvág.

- Ein heim, har menniskju liva í frælsi og javnstøðu og hava ávirkan á síni egnu lívsviðurskifti – eitt rúmligt og tolsamt samfelag.

Tað staðfestir Javnaðarflokkurin í eini niðurstøðu eftir landsfundin í Norðurlandahúsinum í gjár og í dag.

Landsfundurin fegnaðist annars um tey stóru framstigini, sum eru hend serliga á almanna og heilsuøkinum, umframt á skúla- og mentanarøkinum.

- Fundurin fegnast eisini um stóra arbeiðið, ið løgmaður hevur lagt í at røkja uttanríkispolitiska økið og at fáa Føroyar við í altjóðaøgerðina.

Hinvegin harmaðist landsfundurin um, at fleiri av hinum flokkunum á ymsan hátt ætla at beina fyri ætlanini um, at Føroyar skuldu gerast partur av Kyoto avtaluni.

Landsfundurin er alt annað enn nøgdur við marknaðarføringina av mongu úrslitunum hjá flokkinum í hesum valskeiði og áleggur flokkinum at taka henda spurning í fullum álvara.

Annars staðfestir Javnaðarflokkurin, at hann framvegis virkar fyri:

- Frælsi frá fátækt og kúgan og frælsi at menna skapandi evni og møguleikar hins einstaka.

- Javnstøðu fyri øll, soleiðis at øll hava somu møguleikar og skyldur, óansæð sosialt bakstøði, kyn, átrúnað ella etniskan uppruna.

- Samhaldsfesti og brøðralag við menniskju um allan heim og við komandi ættarliðum.

Javnaðarflokkurin kunngjørdi annars, at hann ætlar sær at vinna fólkatingsvalið.

- Javnaðarflokkurin hevur greitt alternativ til loysingaratkvøðuna hjá Sambandsflokkinum og Tjóðveldinum, sigur hann í eini niðurstøðu.

- Vit vilja hava eina nýggja og virðiliga skipan fyri samstarvið við Danmark. Hesa skipanina kalla vit »sjálvstøðugt samstarv«, sigur flokkurin

- Sjálvstøðugt samstarv merkir, at vit beina burtur løgfrøðiligar forðingar og stirvnar tulkingar av donsku grundlógini, soleiðis at Føroyar fáa víðkað sítt uttanríkispolitiska virkisøkið og harvið marknaðaratgongdina munandi.

Javnaðarflokkurin staðfestir, at hann ætlar sær eisini at vinna løgtingsvalið, hetta tí, at tað framvegis er stór avbjóðing at virka fyri, at øll eiga sín lut í samfelagsmenningini. - Tað er framhaldandi okkara skylda, at tryggja, at øll eru við, sigur flokkurin.

Javnaðarflokkurin ásannar, at jú betur grundleggjandi vælferðartænasturnar virka, tess færri detta niðurímillum.

Nú Føroyar eru eitt valdømi, er tað ongantíð meira umráðandi, at øki ikki detta niðurímillum. Flokkurin ásannar, at tað er neyðugt, at lokalfeløgini framvegis verða krummtappurin í politiska arbeiðinum, sigur Javnaðarflokkurin.

# Nógvar broytingar í leiðsluni

**Tað eru fýra nýggj andlit í leiðsluni hjá Javnaðarflokkinum**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Her eru fýra av teimum sum nú mynda leiðsluna í Javnaðarflokkinum. Frá vinstru eru tey Petur Páll Mikkelsen, nývaldur næstformaður, Maud Næs og Eyðgunn Samuelsen, nývaldir starvsnevndarlimir og Jóannes Eidesgaard, afturvaldur formaður*

Tað vóru stórar broytingar, tá ið Javnaðarflokkurin valdi nýggja floksleiðslu á flokstinginum leygarkvøldið.

Jóannes Eidesgaard varð einmælt afturvaldur til floksformann uttan nakað mótvalevni.

Men flokkurin skal eisini hava tveir næstformenn, ein av hvørjum kyni. Bergur Dam í Havn, sum hevur verið næstformaður, segði seg frá og fyri hann varð Petur Páll Mikkelsen í Gøtu, valdur. Hin næstformaðurin, Randi í Jógvansstovu, í Leirvík, varð afturvald.

Somuleiðis segði floksskrivarin, Nita Næs í Nesi í Hvalba, seg frá og nýggjur skrivari er Oluffa Joensen í Gøtu.

Tað vóru heldur ongi mótvalevni til hesar tríggjar postarnar.

Í starvsnevndina søgdu Heðin Klein í Klaksvík og Kristoffur Gaardlykke seg frá og til teir tríggjar sessirnar í starvsnevndini varð stríðsval við at tað at seks valevni bjóðaðu seg fram.

Kristian Magnussen, varð afturvaldur og nývald eru Eyðgunn Samuelsen og Maud Næs.

Tey, sum nú mynda leiðsluna í Javnaðarflokkinum, eru sostatt: Jóannes Eidesgaard, formaður, Petur Páll Mikkelsen og Randi í Jógvansstovu, næstformenn, Oluffa Joensen, skrivari og starvsnevndarlimirnir Kristian Magnussen, Maud Næs og Eyðgunn Samuelsen.

## Harmast um at vit ikki eru við í Kyoto

**Men Kyoto er ein spurningur, sum føroyingar sjálvir mugu taka avgerð um**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Helle Thorning-schmidt vil ikki leggja seg út í føroysk viðurskifti, men tað harmar hana, at vit ikki eru við í Kyoto samstarvinum.

Tað segði hon á stórskíggjanum á landsfundinum hjá Føroya Javnaðarflokki fríggjakvøldið.

Elin Lindenskov, javnaðarkvinna í Tórshavnar Býráð, spurdi hana, hvat um helt um, at føroyingar ikki eru við í Kyoto.

Og forkvinnan í danska javnaðarflokkinum duldi ikki fyri, at hon harmaðist um føroysku støðuna til Kyoto.

- Tað er stórt Co2 útlát í Føroyum og tí vildi eg inniliga havt, at føroyingar vóru við og settu sær nakrar málsetningar fyri at minka útlátið.

- Men tað stendur fullkomiliga til føroyingar sjálvar at gera av og finna útav, so eg farið at vera ógvuliga varin at leggja meg út í hesi viðurskifti í Føroyum.

- Hinvegin vildi eg fegin havt Føroyar við í einum felags veðurlagsarbeiði, legði hon afturat.

Í Norðurlandahúsinum í kvøld hoyrdu væl yvir 100 javnaðarfólk tað donsku javnaðarforkvinnuna, Helle Thorning-Schmidt harmast um føroysku støðuna til Kyoto.